# Lærlingar skulu læra at smíða bát

Fyri at kunna blíva timburmaður, skalt tú hereftir duga at smíða ein føroyskan bát.

Tað heldur Páll á Reynatúgvu, sum í løtuni hevur sæti á tingi fyri Tjóðveldi.

Hann hevur nú lagt uppskot fyri Løgtingið um at samtykkja at biðja á landsstýriskvinnuna í mentamálum um at umskipa lærutíðina til timburmann soleiðis, at føroyskt bátasmíð verður ein partur av læruni.

Hann vísir á hvussu stóran týdning føroyski báturin hevur havt í øldir og, hvussu sermerktur og sjógóður hann er.

Men nú eru glastrevjabátarnir farnir at troka seg fram.

- Tað er okkara skylda, er at tryggja, at mentanararvur okkara, føroyski báturin og føroyskt bátasmíð, ikki fer fyri bakka, sigur Páll á Reynatúgvu.

Tí heldur hann, at føroyskt bátasmíð skal vera ein partur av læruni til timburmann.

- Á tann hátt verður skipað krav og møguleiki at varðveita vitanina um føroyskt bátasmíð og føroyska bátin, sigur Páll á Reynatúgvu.

# Alt SEV verður miðsavnað í Havn

**EL-PRÍSIR Tann 21. desember fer SEV at kalla saman aftur til eykaaðalfund fyri at fáa kommunurnar at góðkenna eina príshækking**

Áki Bertholdsen

- Tað er ongin ivi um, at sleppa vit ikki at hækka prísin á streymi, fer tað at fáa avleiðingar fyri útjaðaran í Føroyum.

Tað staðfestir Páll á Reynatúgvu, formaður í nevndini fyri SEV.

Týsdagin 21. desember fer SEV einaferð enn at kalla saman til eykaaðalfund í eini roynd at fáa kommunurnar at góðtaka eina príshækking.

SEV hevur mælt til, at prísurin hækkar 15 oyru fyri hvørt kilowatt.

Tað fer at geva SEV 40 milliónir afturat í inntøku.

- Fáa vit ikki hesar inntøkurnar, verða vit noydd at skera inn á bein allarstaðni, sigur nevndarformaðurin.

Hann sigur, at enn hevur nevndin í SEV ikki gjørt av, hvat uppskot, hon fer at leggja fyri eykaaðalfundin tann 21. desember.

Men tað er sumt, ið bendir á, at SEV fer at einaferð at skjóta upp, at prísurin hækkar 15 oyru fyri kilowatt tíman.

- Hetta er ein semja ímillum nevnd og leiðslu og hetta hevur El veitingareftirlitið góðkent.

Páll á Reynatúgvu sigur, at tá ið Elveitingareftirlitið hevur góðkent príshækkingina, er tað ein trygd fyri, hon er neyðug fyri at varðveita trygdina og raksturin í SEV.

- Tí skal rættiliga nógv til, áðrenn tilmælið um at hækka prísin 15 oyru fyri kilowatt tíman, verður broytt, leggur hann afturat.



EIN VANLUKKA

*- Sleppur SEV ikki at hækka prísin, verður neyðugt at skera inn á bein og tað verður ein vanlukka, sigur nevndarformaðurin*

## Miðsavna SEV

Hann sigur, at ongin ivi er um, at ein avleiðing verður, at tænastan kring landið fer at versna.

- Sleppur SEV ikki at hækka prísin, verður fyrsta stigið uttan iva at leggja umsitingarnar kring landið niður við teimum uppsøgnum, tað hevur við sær.

- Hetta fer at føra til eina miðsavning, at har SEV verður savnað í miðstaðarøkinum og har umsitingarnar kring landið verða niðurlagdar.

Hinvegin eru tey í SEV samd um at tvíhalda um eina samhaldsfasta skipan, har øll betala tað sama fyri streymin, antin tú býrt í Havn ella í Dímun.

Tey eru eisini samd um, at trygdin verður ikki slakað.

- Vit hava longu verið noydd til at toyggja umvælingar, men tað loysir seg als ikki í longdini. Ein avleiðing av tí hevur verið, at nú vit fóru eftir Heygaverkinum í Vestmanna, varð tað nógv dýrari enn ætlað.

- Slaka vit krøvini til trygdina, førir tað til fleiri streymslit og verri veiting og tað fær álvarsligar avleiðingar fyri samfelagið, sigur Páll á Reynatúgvu.

Ein annar møguleiki er at strika íløgur í varandi orku, men so verða vit enn meiri bundin at oljuni og tað er nettupp hon, sum er so dýr og er høvuðsorsøkin til hallið.

-Innflutningur av olju er eisini stak óheppin fyri landið og kommunurnar, sum eiga SEV, tí vit innflyta olju fyri yvir eina milliard um árið.

- Tað vildi eisini verið sera óheppið, tá i hugsað verður um tær skyldur, SEV hevur at menna burðardygga orku, tí tað vildi verið at sviki tær skyldur, vit hava á økinum, leggur hann afturat.

aki@sosialurin.fo

» **Sleppa vit ikki at hækka prísin, fer tað at fáa avleiðingar fyri útjaðaran**

» **SEV fer enn einaferð at royna at fáa kommunurnar at góðkenna, at el-prísurin hækkar**

# Ongin Sandoyartunnil enn á sinni

Tað verður ongin undirsjóvartunnil gjørdur í Sandoy enn á sinni.

Tað staðfesti Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum, í Løgtinginum í dag, eftir at sandoyartingmaðurin, Gerhard Lognberg, hevði spurt hana eftir tunlinum.

Annika Olsen staðfestir, at samgongan hevur onki er sett av til Sandoyartunnilin á fíggjarlógini fyri 2011 og tað er heldur onki sett av á langtíðaríløguætlanini.

Men hon staðfestir kortini, at talan er um eina góða ætlan, sum kann takast upp aftur, tá ið játtanarligu karmarnir verða rúmari.

Gerhard Lognberg hevur áður verið treytaleysur í kravinum um undirsjóvartunnil, men hann gjørdi av at taka svarið frá landsstýriskvinnuni positivt.

Hann skilti, at hetta er ikki tíðin at fara undir so stóra verkætlan, men hann fegnaðist um, at landsstýriskvinnan framvegis heldur, at talan er um eina skilagóða verkætlan, sum kann takast fram aftur, tá ið tíðirnar eru batnaðar.

Samstundis staðfesti landsstýriskvinnan eisini, at Hestur verður ikki knýtt upp í ein møguligan undirsjóvartunnil í Sandoy.

Hon staðfestir, at sum er, fevnir verkætlan um ein 10,5 km langan undirsjóvartunnil undir Skopunarfirði og um vegir til tunnilin. Streymoyarmegin kemur tunnilin upp við Gomlu Rætt, og Sandoyarmegin kemur tunnilin upp einar 500 metrar frá landsvegnum í Traðardali.

Sostatt er Hestur ikki við í verkætlanini, og kemur Sandoyartunnilin, verður framvegis neyðugt at hava sjóvegis samband út í Hest.

Tað er áður upplýst, at ein Sandoyartunnil fer at kosta átta milliónir krónur í rakstri og tá í hann er komin, er ferjusambandið út í Hest mett at kosta tríggjar milliónir krónur um árið.

Útrokningarnar vísa, at skal Hestur knýtast upp í ein Sandoyartunnil, er tað so nógv dýrari enn at gera íløga í eina ferju, og at reka hana í eitt áramál, at tað ikki loysir seg.